# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Í menniskjum góður tokki

Hetta er síðsta blaðið undan jólunum. Jólaaftan er mánadagin, og harvið verður høgtíðin yvir okkum. Friður á jørð, kvóðu einglarnir, og so løgdu teir afturat og í menniskjum góður tokki. Hesin boðskapurin hevur síðani ljóðað og skapt gleði, men tíverri mugu vit eisini staðfesta, at upp ígjøgnum søguna hevur hann ofta verið orsøk til kreppur og stríð og kríggj.

Kristindómurin og religiónir eru framvegis orsøk til spentar støður, og virðisspurningarnir og konfrontatiónir millum sivilisatiónirnar, sum eru grundaðar á stóru religiónirnar, eru orsøk til stór stríð og stóran spenning.

Kríggj og bardagar eru burtur úr vón og viti. Tað skriva føroyingar undir uppá. Orðaskifti, samráðingar, mýking av støðum og meiri av tí slagnum, sum er grundað á fólkaræði, eru lykilin til framgongd og menning. Tíverri er hetta ikki so kring allan heimin, og tað er tí, at tað verður mett neyðugt at taka til vápnini.

Í stórum kríggjum og alspentum støðum hava jólini havt sín serliga leiklut. Vit minnast tað eitt nú frá Vietnam krígnum, tá ið teir tey seinnu árini ikki bumbaðu á jólum, og tað er tiltikið, tá ið teir í fullkomuliga meiningsleysa 1. heimsbardaga bundu frið á víðvøllinum um jólini. Søgan sigur, at teir í skotgrøvunum sungu gleðilig jól – øðru megin á eingilskum og hinu megin á týskum - og at teir fóru fram á válin at ynskja hvørjum øðrum gleðilig jól, áðrenn teir aftur løgdu seg í gravirnar at miðja eftir hvørjum øðrum!

Í Føroyum eru vit spard fyri kríggj og øllum tí illa, sum fylgir í kjalarvørrinum, tá ið menniskja ber so so primitivt at, sum tað kann bera til at hugsa sær. Kreppur og spenningar heima á landi eru fyri einki at rokna, tá ið sammett verður við aðra staðni í heiminum.

Vit eiga at vera takksom fyri henda veruleika og at seta prís upp á hann. Ikki minst á jólum, tá ið vit eiga at gera burtur úr familjunum, og tá ið tað ikki hevði verið av vegnum, um vit hugsaðu um og heilsaðu og vitjaðu tey, sum eru løgd til síðis, og sum ikki hava førleika og umstøður til sjálvi at skapa hugna.

Í samfelagnum er spenningur á fleiri frontum. Løgtingsval er útskrivað, og valstríðið er langt síðani farið á rull. Tað tykist tó vera semja um, at um jólini skal friður valda, og tað er virðiligt.

Í fyrradagin slitnaðu samráðingarnar um nýggjan sáttmála millum fiskimenninar og reiðararnar. Jólahýrurin skuggar yvir spenninginum, og eftir høgtíðina verður aftur farið undir samráðingarnar og toganini, sum hoyrir samfelagslívinum til.

Sosialurin heilsar øllum við ynskjunum um eini gleðilig jól. Hugsanir okkara leita til teirra, sum hesi jólini sita í sorg og sakni og til teirra, sum eisini á annan hátt fingu tungar byrðar at bera í hesum árinum. Mátti boðskapurin um frið og góðan tokka í menniskjum sokkið seg í hvørt heim og hvørt sinni.

**Sosialurin**

## Vit skulu hava eitt fjøltáttað vinnilív

**– og ikki gloyma, at fiskivinnan er okkara høvðusvinna í dag og allarhelst eisini í morgin**

Val



KITTY MAY ELLEFSEN
Fólkaflokkurin

Bæði í visión 2015 og í almenna kjakinum í Føroyum seinastu árini hevur verið ført fram, at vit skulu hava onnur bein at standa á enn bert fiskivinnuna. Hetta er sjálvandi skilagott; men ofta hevur kjaki borið brá av, at fyri at fáa aðrar vinnur, skulu vit flyta fokus frá fiskivinnuni. Fiskivinnan hevur til tíðir verið umtalað sum ein "minni verd"vinna, ið ikki dregur til sín útbúgvin fólk og hevur eisini verið løgd undir at verða ein beinleiðis forðing fyri menning av nýggjum vinnum.

Tað er umráðandi at vit gera okkum greitt, at tað er í fiskivinnuni at vit hava tær longstu traditiónirnar og óiva eisini teir bestu førleikarnar. Tí er náttúrligt, at nýggir vinnuvegir eisini spretta upp rundan um verandi vinnu.Um vit hyggja at grannum okkara fyri norðan, Íslandi, so hava teir ment ein stóran part av hátøkni fyritøkum rundan um fiskivinnuna. Sum dømi kann nevnast fyritøkur sum Marel.

Tað eru nógv ár síðani, at Íslendingar góvu loyvið til fremmanda arbeiðsmegi, ið serliga hevur verið gagnnýtt av fiskivinnuni; samstundis sum pláss soleiðis bleiv fyri, at Íslendingar sjálvir kundu fara í holt við at gera okkurt annað. Sama síggja vit í grannalondum okkara, so sum Danmark og Svøríki.

Vit vilja flest øll í Føroyum hava, at børn okkara fáa bestu møguligar útbúgvingar og hetta førir sjálvsagt til, at vit framyvir koma at síggja ein alt størri tørv á arbeiðsmegi til vanligt fiskaarbeiði.

Tí skulu vit, samstundis sum vit vilja hava íverksetan og nýhugsan, syrgja fyri, at fiskivinnan og verandi vinnur annars hava so góð kor sum gjørligt. Hetta kann m.a. gerast við, at vinnan fær neyðuga arbeiðsmegi tøka, at vit gera greiðar reglur fyri hvussu vit umsita veiðiloyviðir og náttúrutilfeingi okkara annars.

Tí vit skapa ikki nýggjar vinnur við at avtakað verandi høvðusvinnu okkara; men vit at stimbra fiskivinnuna leggja vit lunnar undir nýhugsan og til menning av nýggjum vinnuvegum.

Men tað krevur at vit hava dirvi at taka neyðugu avgerðirnar. Og tað mugu vit!!!

## Bora hol á trupulleikan heldur enn fjallið

Val



KRISTINA TOFTEGAARD LARSEN
Valevni hjá Sjálvsstýrisflokkinum

Sjálvstýrisflokkurin vísti herfyri, at vit meina tað í álvara, sum stendur í stevnuskráðni, at "arbeiðið upp á vegir, havnir, berghol og lendingar verður framt um alt landið eftir heildarætlan. Samferðslan eftir landi, sjógvi og loftvegis verður útbygd og samskipað."

Hetta var orsøkin til, at flokkurin atkvøddi ímóti nýggjum undirsjóvartunnli til Sandoynna. Tað er stórur munur á, at vera ímóti av illvilja ella tí ein metir, at tað er neyðugt at raðfesta øðrvísi. Grundgevingin fyri, at flokkurin ikki atkvøddi fyri at byrja arbeiðið uppá Sandoyartunnilin 1. november 2009 er, at peningaliga raðfestingin í okkara samfelag er skeiv. Ongin heildarætlan er gjørd fyri slíkar íløgur, eitt nú fyri Suðuroyarleiðina, ið kann hugsast at blíva forlongda farleiðin.

Sjálvstýrisflokkurin er fyri allari sunnari útbygging, men tá talan er um eina so tilvildarliga raðfesting, so meti eg Sandoyartunnilin sum ein luxustrupulleika, tí ein so stór ætlan, ið skal gerast so skjótt, vil ávirka figgjarkarmarnar til onnur týðandi økir í samfelagnum. Og tað hava vit ikki ráð til.

Avgerðir, ið ávirkað so nógv, mugu raðfestast eftir eini heildarætlan. Hesum vilja vit arbeiða fyri. Vit bora hol á trupulleikan heldur enn fjallið!

Ein atkvøða fyri Sjálvstýrisflokkinum er ein atkvøða fyri nýggjari raðfesting!

Gleðilig jól og gott nýggjár.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**

Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.